# Tríggir ómøguligir valmøguleikar

**Løgmaður er kroystur upp í ein krók av Tjóðveldisflokkinum. Hann hevur fingið tríggjar møguleikar í at velja, um hann vil halda fram, men Anfinn Kallsberg kann illa liva víðari við nøkrum teirra. Tórbjørn Jacobsen vil hava treytaleysa umbering**

KRAVBOÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Tórbjørn Jacobsen mátti eta orðini í seg í fjør, tá hann segði, at løgmaður ikki kendi mun á egnum og annara og ikki hevði kunnað verið leiðari í nøkrum øðrum landi. Nú vil hann hava handilin at ganga aftur*

*Mynd: Jens K. Vang*

– Onga viðmerking. Eg havi als onga viðmerking. Vit hava ikki viðgjørt brævið frá Tjóðveldisflokkinum enn. Tit fáa nærri at vita, tá ið eg eri komin til eina niðurstøðu, segði Anfinn Kallsberg beint fyri døgurða mikudagin.

Talan er um trinnar møguleikar, sum Tjóðveldisflokkurin hevur givið løgmanni. Og eingin er mjúkur. Løgmaður má antin reinsa seg fyri tær skuldsetingar, sum verða settar fram í bókini »Skjót journalistin«. Ella má Anfinn Kallsberg opið ásanna, at hann misbrúkti sítt embæti á ólavsøku í fjør fyri at verja sítt egna umdømi. Hetta skal hann biðja um treytaleysa umbering fyri.

Triðji møguleikin, sum Tjóðveldisflokkurin nevnir, er, at Fólkaflokkurin umskipar landsstýrið fyri at endurskapa álitið á løgmansembætið. Og tað merkir í roynd og veru, at løgmaður fer frá og annar kemur í staðin.

## Í saksinum

Ivasamt er, hvat løgmaður kann gera og samstundis varðveita tignina.

Hann kann illa reinsa seg. Rættarliga ber tað bara til við einum máli um ærumeiðing. Grein 271 í revsilógini førir fram, at tú ikki mást føra prógv fram í einum máli, har ein maður longu er dømdur ella fríkendur í rættinum. Men neyvan ætlar løgmaður sær út í eitt rættarmál.

Næsti møguleikin er kanska tann mest sannlíki. Við einari bleytari umbering sleppur løgmaður eina ferð med alla av við hetta málið, sum hevur fylgt honum leingi. Tí góðtekur løgtingið umberingina, er málið endaliga jarðað. Hinvegin viðgongur Anfinn Kallsberg við eini umbering, at hann hevur misbrúkt løgmansembætið, og tað er ikki gott fyri umdømið hjá løgmanni.

Triðji møguleikin merkir, at ein nýggur maður skal setast í hansara stað. Tað gongur løgmaður neyvan við til sjálvur, og spurningurin er eisini, hvør tað kann vera.

Altso hevur Tjóðveldisflokkurin sett løgmann og Fólkaflokkin í eina knípu, sum tað kann vera trupult at koma burturúr.

## Handil ganga aftur

Sostatt er tað helst bara annar møguleikin, sum er sannlíkur, um samstarvið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin skal halda fram. Ein umbering. Tórbjørn Jacobsen, sum mátti taka skuldsetingar aftur á ólavsøku í fjør, skal fáa uppreisn.

– Løgmaður kravdi, eg skuldi taka nøkur orð aftur. Privatpersónurin Anfinn Kallsberg misnýtti løgmansembæti at trýsta ein tingmann at reinsa seg sjálvan. Nú er tað, sum eg segði, skjalprógvað. Løgmaður misbrúkti sítt embæti til sín fyrimun, og tí má hann koma við einari treytaleysari umbering fyri at rætta álitið á løgmann uppaftur, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Spurdur, um Tjóðveldisflokkurin kann liva við einum løgmanni, sum viðgongur, at hann hevur misbrúkt sítt embæti, svarar Tórbjørn Jacobsen:

– Kemur løgmaður við einari treytaleysari umbering, má handilin ganga aftur. Tað er ikki okkara uppgáva at vaska upp og niður í einum øðrum flokki, sigur Tórbjørn Jacobsen.

## Farin fortíð

Í brævinum til løgmann sigur Tjóðveldisflokkurin, at tað, sum hendi á Frostvirkinum í Norðdepli er farið.

»Tað er ikki okkara lutur at gera nakað við fortíðina hja privatpersóninum Anfinn Kallsberg,« stendur í brævinum.

Sagt verður víðari, at Fólkaflokkurin kortini fleiri ferðir hevur drigið Tjóðveldsiflokkin og samgonguna upp í spurningin um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg og gjørt hetta bæði til samgongumál og eitt mál um tignina hjá løgmansembætinum. Tað gjørdi løgmaður í fjør og aftur í farnu viku, sigur Tjóðveldisflokkurin í brævinum.

Víst verður á tað, sum hendi á ólavsøku í fjør, tá ið Tórbjørn Jacobsen noyddist at eta orðini í seg aftur, hann hevði sagt um fortíðina hjá løgmanni. Verða skuldsetingarnar í bókini »Skjót journalistin« ikki tiknar aftur, er greitt, at løgmaður misnýtti sítt løgmansembæti í fjør, verður sagt í brævinum til løgmann.

Eftir øllum at døma kann Tjóðveldisflokkurin liva við eini umbering fyri tað, men spurningurin er, um Anfinn Kallsberg kann liva við eini staðfesting av, at hann misbrúkti sítt embæti framman fyri øllum Føroya fólki.

Tá ið blaðið fór til prentingar var púra óvist, hvat fór at henda. Fólkaflokkurin sat á fundi, har støðan og brævið frá Tjóðveldisflokkinum varð viðgjørt.

**Fakta**

Tjóðveldistreytirnar til løgmann:

1. Antin má Anfinn Kallsberg reinsa seg fyri tær skuldsetingar, sum verða settar fram í bókini »Skjót journalistin«, og sum eru endurtiknar í fjølmiðlunum.

2. Ella má Anfinn Kallsberg ásanna opið, at hann á ólavsøku í fjør misbrúkti løgmansembætið til at steðga orðaskiftinum um sína egnu fortíð og til tess at verja tign løgmansembætisins, biðjur um treytaleysa umbering fyri hesa misnýtslu.

3. Ella tekur Fólkaflokkurin saman við samgonguflokkunum stig til at gera uppskot til umskipanir í landsstýrinum, sum kunnu enduskapa álitið á samgonguna og løgmansembætið.



Til Dagblaðini

Tórshavn 2. desember 2003

**Tjóðveldisflokkurin hevur sent soljóðandi skriv til Fólkaflokkin:**

Tjóðveldisflokkurin hevur viðgjørt støðuna eftir at fortíðin hjá Anfinni Kallsberg aftur er tikin fram í almenna orðaskiftinum.

Anfinn Kallsberg hevur í fjølmiðlunum í gjár viðgjørt tær sera tyngjandi upplýsingarnar, sum nú eru settar fram í almenninginum. Hetta er í sjálvum sær til mikdan skaða fyri løgmansembætið.

Tjóðveldisflokkurin leggur dent á, at tað, sum hendi á Frostvirkinum í Norðdepli í síni tíð, er farið. Tað er ikki okkara lutur at gera nakað við fortíðina hjá privatpersóninum Anfinni Kallsberg.

Fólkaflokkurin hevur kortini fleiri ferðir drigið Tjóðveldisflokkin og samgonguna upp í spurningin um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg og gjørt hetta bæði til samgongumál og eitt mál um tignina hjá løgmansembætinum. Tað gjørdi Fólkaflokkurin á ólavsøku í fjør og aftur í skrivi til Tjóðveldisflokkin í farnu viku.

Fólkaflokkurin hevur sjálvur lagt dent á, at tignin hjá løgmansembætinum skal varðveitast. Hvørvur tignin og virðingin fyri løgmansembætinum, hvørvur virðingin fyri fólkaræðinum.

Fólkaflokkurin kravdi á ólavsøku í fjør, at ein tingmaður í Tjóðveldisflokkinum stóð til svars fyri at varðveita tignina hjá løgmansembætinum. Hesum kravi gekk hann á møti, og skuldsetingar móti løgmanni vóru afturtiknar.

Verða tær skuldsetingar og tær upplýsingar, sum nú eru settar fram í bók og eru viðgjørdar alment av løgmanni, ikki afturvístar, er greitt, at løgmaður og Fólkaflokkurin á ólavsøku í fjør misnýttu løgmansembætið. Hetta oyðileggur virðingina fyri tí týdningarmikla løgmansembætinum.

Tjóðveldisflokkurin krevur tí, at Fólkaflokkurin og Anfinn Kallsberg taka tey stig, sum eru neyðug til tess at endurreisa virðingina og álitið á løgmansembætið og samgonguna:

1. Antin má Anfinn Kallsberg reinsa seg fyri tær skuldsetingar, sum verða settar fram í bókini "Skjót journalistin", og sum eru endurtiknar í øllum fjølmiðlum.



# Tjóðveldisflokkurin vil ikki úr samgonguni

**Samfelagsfrøðingurin, Jóanes N. Dalsgaard, sigur, at eitt val í úrtíð vil verða eitt stórt prestisjutap fyri Tjóðveldisflokkin. Nógvar yvirtøkur standa fyri framman, og tí vil Tjóðveldisflokkurin fara langt fyri at halda fast um samgonguna.**

KRAVBOÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Nú skal tignin hjá løgmansembætinum endurreisast. Týskvøldið komu harraboð frá Tjóðveldisflokkinum um, at løgmaður skal taka neyðugu stigini fyri at endurreisa virðingin og álitið á løgmansembæti og samgonguna. Tríggir møguleikar hevur løgmaður fingið

Hann kann velja ímillum at reinsa seg, at umbera seg og í triðja føri kann samgongan koma ásamt um ein nýggjan løgmann. Tjóðveldisflokkurin hevur so í fyrsta føri valt at spæla bóltin yvir aftur til løgmann og Fólkaflokkin, og lata løgmanni avgerandi leiklutin í spurninginum um samgongan skal halda fram.

Vit hava spurt samfelagsfrøðingin, Jóanes N. Dalsgaard um hví Tjóðveldisflokkurin valdi júst hesa loysnina.



*Jóanes N. Dalsgaard, samfelagsfrøðingur, sigur, at Tjóðveldisflokkurin hevur ov nógv at tapa við einum løgtingsvali í úrtíð, og tí torir flokkurin ikki at siga samgonguna upp*

## Prestisjutap

Jóanes N. Dalsgaard sigur, at Tjóðveldisflokkurin er í málinum um fortíðina hjá Anfinn Kallsberg komin í eina tvístøðu. Flokkurin hevur alment sagt, at hann ikki ynskir at vera við í viðgerðini av persónsmálum, men kortini verður hann trýstur til at hava eina støðu í hesum málinum.

– Í málinum um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg, er Tjóðveldisflokkurin tann einasti flokkurin, sum kann gera nakað aktivt, tí spurningurin er, hvussu nógv andstøðan kann gera í løtuni. Tjóðveldisflokkurin hevur eisini gjørt seg til talsmann fyri reinføri í føroyskum politikki, men hinvegin vil flokkurin ikki úr samgonguni, og tí er málið eitt stórt dilemma fyri flokkin, sigur Jóanes N. Dalsgaard.

Hann leggur afturat, at vildi Tjóðveldisflokkurin veruliga sleppa úr samgonguni, so hevur málið við fortíðini hjá løgmanni verið ein góður møguleiki, men hesin møguleikin bleiv ikki valdur, og tað sigur honum, at flokkurin ikki vil úr samgonguni.

Jóanes N. Dalsgaard heldur orsøkina til, at Tjóðveldisflokkurin gevur Fólkaflokkinum og løgmanni enn ein møguleika er, at eitt løgtingsval í úrtíð hevði verið eitt stórt prestisjutap hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Politikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum í dag er nógv størri partur av samlaða politikkinum hjá samgonguni, enn fyri fýra árum síðan. Fyri framman standa 24 yvirtøkur, og tað er ein ov stórur kostnaður at lata hesar yvirtøkur fara framvið við borðinum, og tað vil Tjóðveldisflokkurin ikki hava á sær, sigur samfelagsfrøðingurin

Hinvegin heldur hann, at Fólkaflokkurin kann lættari liva við einum vali í úrtíð . Fólkaflokkurin hevur ikki so nógv at tapa sum Tjóðveldisflokkurin, og veljararnir hjá Fólkaflokkinum kunnu óivað liva við, at løgmaður játtar, at hann var við at gera nakað óregluligt fyri 25 árum síðan.

## Torskilt

Jóanes N. Dalsgaard heldur, at politiska støðan í løtuni er rættiliga torskild.

–Tað er ein spurningur um trúvirðið, real politikk og avleiðingar av einum vali í úrtíð, sigur hann Tjóðveldisflokkurin hevur størsta trupulleikan av at fara til val nú, tí flokkurin fær tað ómetaliga torført við at koma í samgongu aftur, heldur Jóanes N. Dalsgaard.

Hann sigur, at eitt val í úrtíð, útihýsir møguleikanum fyri, at Tjóðveldisflokkurin finnur saman við Fólkaflokkinum aftur. Jóanes setur eisini spurning við, hvussu áhugaður ein Javnaðarflokkurin er í einum møguligum samgongusamstarvi við Tjóðveldisflokkin.

– Lat okkum siga, at Tjóðveldisflokkurin fær eini 30 % av atkvøðunum. Hetta er gott úrslit fyri flokkin, men so løgið tað ljóðar, so kann góða úrslitið geva bakslag. Fær Tjóðveldisflokkurin so stóra undirtøku, so er ikki óhugsandi, Tjóðveldisflokkurin setur sum krav at fáa 2/3 av øllum landsstýrismonnunum í einari møguligari samgongu, og tað kann geva bakslag heldur Jóannes N. Dalgaard.

Hann vísir millum annað til, at báðir andstøðuflokkarnar vilja sleppa fram at valdinum og profilera seg, men tað verður ómetaliga torført, um Tjóðveldisflokkurin verður so stórur. Samfelagsfrøðingurin væntar tí, at andstøðuflokkarnir heldur fara at hugsa um samgongusamstarv við ein minni flokki, har teir fáa betri møguleika at fáa størri ávirkan, sigur Jóannes N. Dalsgaard at enda.

Jóannes Eidesgaard:

# Løgmaður fer at umbera seg

**Formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, væntar, at løgmaður velur loysn nummar tvey, har hann fer at geva Tjóðveldisflokkinum eina umbering. Góðtekur Tjóðveldisflokkurin eina møguliga umbering frá løgmanni, so hevur rættartrygdin í Føroyum fingið eitt skot fyri bógvin, heldur hann**

KRAVBOÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Formaðurin í Javnaðarflokkurin, Jóannes Eidesgaard, situr framvegis spentur og bíðar, hvørja endaligu støðu, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin fara koma fram til í málinum um fortíðina hjá løgmanni á Frostvirkinum í Norðdepli.

Hann heldur, at málið er eitt frálíkt dømi, um eitt val millum vald og moral. – Eg havi ein mistanka um, at Tjóðveldisflokkurin fer at velja valdið fram um moralin, og tað harmar meg nógv. Gera teir tað, so skúgva teir alla virðingina í einum demkratiskum samfelagi til viks, og tað er rættiliga álvarsamt, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum sigur, at møguleiki eitt er útihýstur, tí løgmaður hevur ikki møguleika at reinsa seg, eftir at hann hevur alment viðgingið, at óreglusemið fór fram á Frostvirkinum. Jóannes Eidesgaard væntar, at løgmaður fer at velja loysn nummar tvey, tí Anfinn Kallsberg er ikki maður nokk at leggja kongin, og tí fer hann at royna at umbera seg.

– Spurningurin verður hvussu umberingin verður orðað, og um Tjóðveldisflokkurin kann góðtaka hana. Verður tað til eina umbering, og hon verður góðtikin, so er Tjóðveldisflokkurin farin langt, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, fer at fáa ómetaliga torført við at sannføra føroyingar um, at tað er rætt at yvirtaka rættarskipanina, tá tað eftir øllum at døma verður sæð gjøgnum fingrarnar hjá summum (løgmaður, blðm), meðan onnur skulu rættarfylgjast.

Góðtekur Tjóðveldisflokkurin eina umbering, er tað eitt stórt skot fyri bógvin fyri rættartrygdini í Føroyum, heldur Jóannes Eidesgaard at enda.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2